UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

Sørvágs kommuna
Varðagøta 8
380 Sørvágur

Tórshavn, 21. juni 2024
J.nr.: 24/02903-10

**Vegleiðandi ummæli viðvíkjandi avgerð hjá borgarstjóranum í Sørvágs kommunu um at taka stevning aftur vegna kommunustýrið**

Løgmaður hevur í skrivi til Umhvørvismálaráðið tann 30. januar 2024 boðað frá, at hann, vísandi til § 55, stk. 1, í fráboðan nr. 164 frá 22. desembur 2022 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýriskvinnurnar og landsstýrismenninir, hevur gjørt av, at landsstýriskvinnan í umhvørvismálum skal viðgera eina klagu um borgarstjóran í Sørvágs kommunu. Hetta eftir at Løgmálaráðið í skrivi til løgmann tann 24. januar 2024 hevur sagt seg vera ógegnigt at viðgera klaguna.

**Niðurstøða**

Borgarstjórin helt ikki galdandi reglur, tá ið hann vegna kommunustýrið tók avgerð um at taka stevningina, sum kommunustýrið hevði samtykt, aftur.

**Lógargrundarlag**

- løgtingslóg nr. 87 frá 7. mai 2000 um kommunustýri, sum broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018 (kommunustýrislógin)

**Gongdin í málinum**

*20. februar 2020*

Sørvágs kommuna sendir hagapørtunum í Sørvági skriv um at keypa matr. nr. [redacted] Talan er um 1.200 m$^2$ av fjørulendi, sum tað samlaða markatalið í Sørvági eigur.

*30. novembur 2020*

Eftir at bara tríggir hagapartar hava svarað skrivinum tann 20. februar 2020, samtykkir kommunustýrið í Sørvágs kommunu eftir tilmæli frá havnarnevndini og fíggjarnevndini at ognartaka matr. nr. [redacted]. Sørvágs kommuna býður undan og eftir ognartøkuna eigarunum 58 kr./m$^2$ í endurgjaldi, men eigararnir góðtaka ikki upphæddina.

*16. desembur 2020*

Ognartøkan av matr. nr. [redacted] verður tinglýst.

*24. juni 2021*
Metingarnevndin sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir er á ástaðarfundi í Sørvági at skoða fjørulendið, sum fevnir um matr. nr.[redacted] og sum nú er tyrvt. Eftir ástaðarfundin hittir metingarnevndin umboð fyri Sørvágs kommunu og eigarar á fundi. Til umrøðu er m.a. virðið á fjørulendi, og formaðurin í metingarnevndini nevnir, at praksis á Búnaðarstovuni er at selja fjørulendi, sum var talan um dyrkað lendi. Umboð fyri eigararnar nevna eitt dømi um lendi, sum er er selt fyri 105 kr./m$^2$. Sakførarin hjá Sørvágs kommunu sigur, at hetta lendið var planerað. Eigararnir nevna eisini eitt dømi um, at fjørulendi er selt fyri 130 kr./m$^2$.

*26. august 2021*
Metingarnevndin ásetur endurgjaldið fyri tað ognartikna fjørulendið í Sørvági at vera 89 kr./m$^2$.

*28. septembur 2021*
Fíggjarnevndin í Sørvágs kommunu mælir kommunustýrinum til at royna málið um endurgjaldsupphæddina í rættinum.

*29. septembur 2021*
Kommunustýrið samtykkir at fylgja tilmælinum hjá fíggjarnevndini um at royna málið um endurgjaldsupphæddina í rættinum (mál nr. 121/2021).

*15. septembur 2023*
Eftir at Sørvágs kommuna frammanundan hevur samtykt at leggja málið fyri rættin, tekur sakførarin hjá Sørvágs kommunu eftir boðum frá borgarstjóranum á fyrireikandi rættarfundi stevningina aftur vegna kommununa. Metingin hjá metingarnevndini tann 26. august 2021 stendur tí við, og Sørvágs kommuna skal rinda hagapørtunum 89 kr./m$^2$ í endurgjaldi.

*16. oktobur 2023*
Føroya rættur staðfestir á rættarfundi, at Sørvágs kommuna hevur tikið stevningina aftur, og ger av, at hvør partur skal bera sín kostnað.

*3. novembur 2023*
Sakførarin hjá Sørvágs kommunu skrivar til kommununa, at rættarmálið móti høgunum er lokið, og at kommunan skal rinda hagapørtunum 89 kr./m$^2$ í endurgjaldi.

*13. desembur 2023*
Borgarstjórin í Sørvágs kommunu skrivar til hagapartarnar, at metingarnevndin tann 26. august 2021 hevur ásett endurgjaldið at vera 89 kr./m$^2$, og at endurgjaldið verður goldið høgunum. Borgarstjórin skrivar, at við hesum er málið viðvíkjandi ognartøku av matr. [redacted] í Sørvági endaliga avgreitt.

*12. januar 2024*
Í telduposti til kommunustýrið sigur borgarstjórin í Sørvágs kommunu seg hava fingið sakføraran hjá kommununi at greiða frá gongdini í ognartøkumálinum.

Í frágreiðingini, sum borgarstjórin leggur við, greiðir sakførarin m.a. frá, at kommunan samtykti at leggja málið fyri rættin, av tí at metingarnevndin hevði virðismett lendið sum *gott*

*og dyrkingarbært lendi*. Í sambandi við rættarmálið hevði tann útnevndi metingarmaðurin í frágreiðing tann 23. august 2023 sagt tað bera illa til at áseta handilsvirðið neyvt, við tað at tað ikki sást, hvussu ognirnar lógu í lendinum undir út- og uppfyllingini. Metingarmaðurin hevði síðan víst til ein handil, sum skuldi vera farin fram í 2018-2019, har ið lendi við bátahylin varð keypt til ferðavinnuendamál fyri 130 kr./m$^2$. Sakførarin sigur seg hava mett metingina hjá metingarmanninum at vera hefta við mistøkum umframt at vera sera ógreiða. Hann sigur tað vera alment kent, at ikki ber til at áseta handilsvirðið á ognartiknum lendi bara við at vísa til ein einstakan handil, har ið annað lendi er keypt til serligt endamál. Til at áseta handilsvirðið krevst hinvegin ein generell heildarmeting. Sakførarin sigur, at samlaða upphæddin fyri tað ognartikna lendið ikki er stór, og at hann tí mælti Sørvágs kommunu til at taka rættarmálið aftur. Sakførarin metti ikki kostnaðin í sambandi við rættarmálið – m.a. av at seta metingarmanninum nýggjar spurningar ella at biðja um at fáa nýggjan metingarmann útnevndan, um frágreiðingin hjá tí setta metingarmanninum gevur ábendingar um, at hann ikki er førur fyri at áseta marknaðarvirðið – at standa mát við ta fíggjarligu støðdina á málinum. Sakførarin vísir á, at við tað at hagapartarnir ikki hava sett fram krav um at halda fram við rættarmálinum, er málið burturfallið, uttan at rætturin hevur gjørt úrskurð í málinum. Tí stendur metingin hjá metingarnevndini við, og tí skal Sørvágs kommuna rinda hagapørtunum endurgjald við støði í hesi metingini. Sakførarin vísir at enda á, at fyrireikingin av rættarmálinum als ikki var liðug, og skuldi málið hildið fram, skuldi lendið verið útgreinað nærri og yvirlit yvir prísir lagt fram, m.a. prísir fyri ognartøku o.a. Sakførarin sigur seg vera rættiliga vísan í, at Føroya rættur ikki hevði komið fram til eitt hægri [*sic*] tal enn tað, sum metingarnevndin ásetti, men meinar ivaleyst eitt *lægri* tal.

*17. januar 2024*
Í telduposti til borgarstjóran í Sørvágs kommunu og kommunustýrið heitir ein kommunustýrislimur á borgarstjóran um at greiða nærri frá, hví Sørvágs kommuna tók stevningina aftur. Hann spyr, hví borgarstjórin er farin ímóti eini samtykt hjá kommunustýrinum, hvørja heimild borgarstjórin heldur seg hava til at taka hetta stigið, um nakað annað er avtalað skrivliga við hagapartarnar enn skrivið, sum varð sent hagapørtunum, hvør annar ið hevur skrivað undir slík møgulig skriv, og av hvørji kontu peningurin er tikin.

Sama dag skrivar eisini klagarin til kommunustýrið og borgarstjóran, at hann er samdur við kommunustýrislimin, og at hann ikki heldur, at tað kann góðtakast, at kommunustýrið ikki hevur fingið nøktandi svar frá borgarstjóranum.

*22. januar 2024*
Í skrivi til Løgmálaráðið tann 22. januar 2024 klagar formaðurin í teknisku nevnd í Sørvágs kommunu um avgerðina hjá borgarstjóranum at taka stevningina, sum kommunustýrið hevði samtykt, aftur uttan at leggja málið fyri kommunustýrið.

*23. januar 2024*
Í telduposti til teir báðar kommunustýrislimirnar, sum høvdu skrivað til borgarstjóran og kommunustýrið tann 17. januar 2024, endurgevur borgarstjórin í Sørvágs kommunu fyrst eina skrivliga frágreiðing hjá sakføraranum hjá kommununi.

Í frágreiðingini vísir sakførarin m.a. á, at hann, tá ið metingarnevndin hevði ásett endurgjaldið fyri ognartøkuna, hevði mælt Sørvágs kommunu til at stevna. Sum rættarmálið varð fyrireikað, var sakførarin tó komin eftir, at praksis – at fjøra í útgangsstøðinum verður príssett sum yvirliggjandi bøur – liggur so fast, at Sørvágs kommuna ikki hevði *stórvegis* møguleika at fáa

viðhald í málinum, og at útreiðslurnar ikki stóðu mát við støddina á málinum. Hann hevði tí mælt Sørvágs kommunu til at taka stevningina aftur, og kommunan hevði fylgt tilmælinum, og málið varð afturkallað. Sakførarin sigur hetta vera vanliga mannagongd.

Sakførarin sigur tað vera "møguligt at umsitingin átti at havt lagt spurningin um afturtøku av málinum fyri bygdaráðið, tá tað var bygdaráðið, sum tók avgerð um at stevna", og leggur afturat, at borgarstjórin "hevur heimild at taka støðu til daglig rakstrarviðurskifti". Av tí at hann ikki metir málið um at taka stevningina aftur at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, metir hann talan vera um eina "formsak". Sakførarin heldur, at tað hevði verið *løgið*, um kommunustýrið gekk ímóti hansara tilmæli um at taka stevningina aftur, tá ið stevningin upprunaliga varð úttikin eftir hansara tilmæli.

Síðan svarar borgarstjórin spurningunum, sum ein kommunustýrislimur hevur sett borgarstjóranum í telduposti tann 17. januar 2024.

Spurdur, hví hann er farin ímóti eini samtykt hjá kommunustýrinum, svarar borgarstjórin, at sakførarin hjá kommununi var á veg inn í Føroya Rætt, tá ið hann ringdi til sín at spyrja, um kommunan vildi taka málið aftur. Sakførarin segði seg vera ónøgdan við metingina hjá metingarmanninum, sum rætturin hevði útnevnt, og metti ikki, at kommunan hevði fingið viðhald í lægri fermetraprísi enn tí, sum metingarnevndin hevði ásett. Borgarstjórin sigur, at tað hevði havt útreiðslur við sær at hildið fram við málinum, og at sakførarin vísandi til støddina á málinum og hesar útreiðslurnar mælti til at kalla málið aftur. Borgarstjórin metir seg vísandi til tilmæli hjá sakføraranum at hava "handlað eftir bestu sannføring fyri kommununa".

Spurdur, hvørja heimild hann hevur at taka hesa avgerðina, svarar borgarstjórin, at avgerðin "skuldi takast í somu løtu", sum sakførarin ringdi, og at hann sum umisitingarleiðari metti tað at vera best at fylgja tilmælinum hjá sakføraranum.

Spurdur, um nakað annað var avtalað skrivliga við hagarnar enn skrivið, sum var sent høgunum, sigur borgarstjórin seg ikki vita, hvat skrivligt tilfar ið sipað verður til. Borgarstjórin vísir á, at ognirnar vórðu ognartiknar í desembur 2020, og sigur tað siga seg sjálvt, at ongar avtalur eru við hagarnar.

Spurdur, hvør annar ið hevur skrivað undir hesi møguligu skrivini, svarar borgarstjórin, at ognartøkan varð framd í desembur 2020, og nevnir nøvnini á táverandi borgarstjóranum og skrivaranum, sum skrivaðu undir skjalið.

Spurdur, hvørji kontu peningurin er tikin av, svarar borgarstjórin, at hann er tikin av havnarkontuni.

Seinni sama dag skrivar klagarin til Løgmálaráðið, at svarið hjá borgarstjóranum als ikki er nøktandi, og at borgarstjórin als ikki fyriheldur seg til sínar skyldur. Klagarin sigur, at borgarstjórin munnliga hevur sagt seg hava borið seg skeivt at, men at hann nú roynir at verja borg.

*24. januar 2024*
Løgmálaráðið boðar løgmanni frá, at ráðið metir seg at vera ógegnigt at viðgera klaguna um borgarstjóran í Sørvágs kommunu.

*30. januar 2024*
Løgmaður boðar Umhvørvismálaráðnum frá, at hann hevur gjørt av, at landsstýriskvinnan í umhvørvismálum skal viðgera klaguna um borgarstjóran í Sørvágs kommunu.

*8. februar 2024*
Umhvørvismálaráðið sendir borgarstjóranum í Sørvágs kommunu klaguna til viðmerkingar.

*20. februar 2024*
Borgarstjórin í Sørvágs kommunu sendir Umhvørvismálaráðnum sínar viðmerkingar til málið.

Borgarstjórin greiðir frá, at tá ið metingarnevndin í august 2021 ásetti endurgjaldið fyri ognartøkuna at vera 89 kr./m$^2$, bar tað í sær, at endurgjaldið fyri tað ognartikna lendið varð 36.784 kr. størri enn endurgjaldið, sum Sørvágs kommuna hevði boðið hagapørtunum. Við tað at metingarnevndin hevði ásett endurgjaldið við støði í dyrkaðum lendi, hevði sakførarin hjá kommununi mælt kommununi til at royna málið fyri rættinum. Síðan varð stevning úttikin, rættarmálið varð fyrireikað, og rætturin útnevndi ein metingarmann. Borgarstjórin sigur, at niðurstøðan hjá metingarmanninum var so ógreið, at sakførarin boðaði frá, at skuldi rættarmálið halda fram, mátti hann seta metingarmanninum fleiri spurningar. Av tí at talan var um eina sera lítla upphædd, mælti sakførarin í staðin kommununi til at taka stevningina aftur. Sakførarin segði seg hava kannað praksis hjá Landsverki og Búnaðarstovuni og vera komnan eftir, at fjørulendi sum útgangsstøði verður virðismett samsvarandi yvirliggjandi bø. Sakførarin hevði samstundis mælt kommununi til at rinda hagapørtunum endurgjald samsvarandi metingini hjá metingarnevndini.

Borgarstjórin sigur seg hava mett, "at talan var um eina avgreiðslusak fyri kommununa, sum lá innanfyri heimildina hjá kommunustýrisformanninum", og leggur afturat, at avgerðin ikki hevði útreiðslur við sær fyri kommununa. Borgarstjórin sigur, at sakførarin ikki metti talan at vera um eitt prinsippmál, sum fór at fáa serligar avleiðingar fyri kommununa, men eitt avgreiðslumál

Borgarstjórin sigur síðan, at hann "kanska átti at havt lagt málið um afturtøku av stevningini fyri kommunustýrið", og leggur afturat, at talan møguliga var um *"ein minni formellan feil"*.

Borgarstjórin sigur seg hava ilt við at ímynda sær, at kommunustýrið, sum eftir tilmæli frá sakføraranum hjá kommununi hevði samtykt at stevna, ikki eisini hevði fylgt ráðunum hjá sakføraranum í sambandi við afturtøku av málinum.

**Umhvørvismálaráðið skal viðmerkja:**
Landsstýrisfólkið í kommunumálum hevur eftirlit við kommunum og kommunalum samstørvum, sbr. § 48, stk. 1, í kommunustýrislógini. Eftirlitið við kommunum er av rættarligum slag og fevnir um alt virksemi í eini kommunu, sum verður útint av ella vegna kommunustýrið.

Úr sjónarhorninum hjá eftirlitsmyndugleikanum kann ein avgerð í kommunuumsitingini altíð førast aftur til kommunustýrið. Tí seta allar ásetingarnar í kommunustýrislógini, sum áseta heimildirnar hjá eftirlitsmyndugleikanum, heimildirnar í samband við avgerðir ella vantandi avgerðir hjá kommunustýrinum.

Eftirlitsmyndugleikin roynir ikki, um ein ólóglig atgerð kann førast aftur til eina nevnd, ein nevndarformann ella borgarstjóran. Eftirlitsmyndugleikin má halda seg til, at kommunustýrið má taka neyðugar avgerðir og halda nevndarlimum, nevndarformonnum ella borgarstjóranum føstum upp á ábyrgdina at lúka tær skyldur, sum teirra embætir bera í sær. Tað liggur á kommunustýrinum at taka avgerðir og áseta reglur o.a., sum skal galda fyri virksemið hjá nevndunum og umsitingini, og tað liggur somuleiðis á kommunustýrinum at hava eftirlit við, at nevndir og umsiting halda ásettar reglur og annars røkja sítt embæti.

Tað liggur tí uttan fyri málsførleikan hjá eftirlitsmyndugleikanum at seta tiltøk í verk mótvegis einstøkum kommunustýrislimum at fáa teir at halda sínar skyldur. Hetta er eitt mál fyri kommunustýrið.

Hevur eitt kommunustýri tikið eina avgerð, sum er ímóti galdandi lóggávu, kann landsstýrismaðurin sambært § 55, stk. 1, í kommunustýrislógini ógilda hana ella fyribils taka hana av, meðan málið verður viðgjørt. Er avgerðin framd í verki, kann landsstýrismaðurin sambært § 55, stk. 1, nr. 1-3, tó bara ógilda hana ella fyribils taka hana av, um tríggjar treytir eru loknar:

1) Ein partur í málinum skal skrivliga hava heitt á landsstýrismannin um at ógilda,
2) høvi skal ikki vera at klaga ikki eftir aðrari lóggávu, og
3) avgerandi fyrilit, serliga fyri privatum áhugamálum, skulu ikki tala ímóti at ógilda.

Ein avgerð hjá eftirlitsmyndugleikanum um at ógilda eina ólógliga avgerð hjá eini kommunu sambært § 55, stk. 1, í kommunustýrislógini er vend ímóti sjálvari tí ólógligu avgerðini og ikki eini atgerð, sum fremur avgerðina í verki. Ógildan er tí í útgangsstøðinum treytað av, at tann ólógliga avgerðin ikki er framd í verki. Ein avgerð er framd í verki, tá ið hon hevur fingið rættarvirknað úteftir og kommunustýrið tí ikki longur hevur ræði á málinum.

Eftirlitsmyndugleikin kann taka eitt mál upp, hóast greitt er, at talan ikki verður um at brúka heimildirnar í § 55, stk. 1-2, í kommunustýrislógini. Eftirlitsmyndugleikin kann í tí førinum við einum vegleiðandi ummæli lata kommunustýrið vita, um og hvar ið eftirlitið metir galdandi reglur at vera brotnar.

Við tað at avgerðin hjá borgarstjóranum í Sørvágs kommunu um at taka stevningina aftur vegna kommununa varð framd í verki tann 15. septembur 2023, tá ið stevningin varð afturtikin á fyrireikandi rættarfundi, og við tað at treytirnar í § 55, stk. 1, nr. 1-3, í kommunustýrislógini fyri ógilding ikki eru loknar, ger Umhvørvismálaráðið eitt vegleiðandi ummæli, har ið hugt verður eftir, um borgarstjórin í Sørvágs kommunu helt galdandi reglur, tá ið hann vegna kommunustýrið tók avgerð um at taka eina stevning, sum kommunustýrið hevði samtykt, aftur.

Í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini er ásett:

> *Stk. 3.* Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva.

Í § 4, stk. 1, 1. pkt., í kommunustýrislógini er ásett, at kommunustýrið stýrir kommunuviðurskiftum. Ásetingin gevur kommunustýrinum málsførleika at taka avgerð í einum og hvørjum máli, sum viðvíkur kommununi, og eingi onnur kommunugøgn hava

málsførleika at royna avgerðir hjá kommunustýrinum. Ásetingin ber eisini í sær, at tað í útgangsstøðinum bara er kommunustýrið, sum kann broyta avgerðir hjá kommunustýrinum, og § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini gevur tí bara í heilt serligum førum einum borgarstjóra heimild til at taka broytta avgerð í einum máli, sum kommunustýrið hevur tikið avgerð um.

Atgongdin hjá borgarstjóranum við heimild í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini at taka avgerð í málum, sum kommunustýrið frammanundan *hevur* tikið avgerð um, má hildin upp ímóti tí grundleggjandi meginregluni sambært § 4, stk. 1, 1. pkt., metast at vera avmarkað til førir, har ið eyðsýndir skeivleikar eru við avgerðini hjá kommunustýrinum, har ið grundarlagið fyri avgerðini hjá kommunustýrinum eyðsæð er skeivt, ella har ið tað kann koma kommunustýrinum undir endurgjaldsábyrgd at fremja avgerðina í verki.

Tað liggur í fyrstu umbering á borgarstjóranum sjálvum at meta, um nøkur av treytunum fyri at taka avgerð sambært § 21, stk. 3, er lokin. Tekur ein borgarstjóri avgerð vegna kommunustýrið sambært § 21, stk. 3, metir Umhvørvismálaráðið, at hann uttan drál eigur at kunna kommunustýrið um avgerðina, við tað at kennskapur til avgerðina er ein fyritreyt fyri, at kommunustýrislimir kunnu brúka tann sonevnda initiativrættin sambært § 15, stk. 1, í kommunustýrislógini til at reisa spurningin, um avgerðin var skynsom ella møguliga lóglig. Kommunustýrið hevur eftirlit við borgarstjóranum og hevur møguleika at umrøða og finnast at metingini hjá einum borgarstjóra, sum vísandi til § 21, stk. 3, hevur mett seg at hava rætt til at taka avgerð vegna kommunustýrið.

Kommunustýrið kann ikki við almennum gildi avmarka málsførleikan hjá borgarstjóranum at taka avgerð sambært § 21, stk. 3, men kann, tá ið ræður um heimildina hjá borgarstjóranum at taka avgerð í málum, sum eingin ivi stendst av, áseta, at einstøk mál ella sløg av málum altíð skulu leggjast fyri kommunustýrið til avgerðar. Á henda hátt verður nágreinað, at hesi málini *ikki* eru av slíkum slag, at treytin um, at eingin ivi skal standast av teimum, er lokin. Eisini kann kommunustýrið áseta leiðreglur fyri avgerðum hjá borgarstjóranum vegna kommunustýrið, tá ið talan er um nærri tilskilað sløg av málum. Sambært § 15, stk. 1, 2. pkt., í kommunustýrislógini skulu nevndir og borgarstjórin, við teimum avmarkingum, sum lógin ásetur, fylgja avgerðum hjá kommunustýrinum. Einki er til hindurs fyri, at kommunustýrið gevur borgarstjóranum víðari heimildir enn eftir § 21, stk. 3, at taka avgerðir, um hetta ikki er í ósamsvari við lóggávuna og kommunustýrið er samt um hetta.

Sambært kommunustýrislógini liggur tað á borgarstjóranum, sum hevur ta dagligu leiðsluna av kommunufyrisitingini um hendi, sbr. § 20, stk. 1, 1. pkt., at síggja til, at mál, sum krevja kommunustýrisviðgerð, fáa slíka viðgerð, sbr. § 21, stk. 2, og at farið verður fram sambært samtyktum hjá kommunustýrinum, sbr. § 21, stk. 4.

Borgarstjórin hevur sambært § 21, stk. 3, lógarfestan málsførleika at taka avgerð vegna kommunustýrið í málum, sum ikki tola at bíða, ella sum eingin ivi stendst av. At § 21, stk. 3, hóast tað ikki skilst á orðaljóðinum, snýr seg um avgerðir vegna kommunustýrið, skilst – í donsku ásetingini, sum var fyrimynd fyri § 21, stk. 3, skilst tað á sjálvum orðaljóðinum – bæði á samanhanginum, sbr. § 21, stk. 2 og 4, og á teimum serligu viðmerkingunum til ásetingina, sum siga, at "borgarstjórin hevur eina lógarfesta heimild til, *kommunustýrisins vegna*, at taka avgerð í ávísum málum, sum ikki tola at bíða, ella har eingin orsøk er til iva". Í § 25, stk. 1, 2. pkt., í áður galdandi løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1997 um føroysku kommunurnar skiltist somuleiðis á orðaljóðinum, at talan var um avgerðir vegna kommunustýrið.

Kommunustýrislógin gevur *ikki* borgarstjóranum málsførleika at taka avgerð vegna nevndirnar, og tí viðvíkur § 21, stk. 3, serliga málum, sum ikki krevja nevndarviðgerð, og málum, sum hava verið fyri nevnd, og har ið tilmæli er latið kommunustýrinum. Hevur eitt mál sovorðnan skund, at tað hvørki ber til at leggja tað fyri kommunustýrið ella fyri nevnd, kann borgarstjórin tó taka avgerð eftir at hava biðið viðkomandi nevndarformann um eina fráboðan, sbr. § 31, stk. 2. Støðan er serlig, um talan er um fíggjarnevndina, har borgarstjórin sjálvur er fastur formaður, sbr. § 38, stk. 1, 2. pkt., í kommunustýrislógini. Fæst ikki samband við viðkomandi nevndarformann, má borgarstjórin, um hann metir, at málið ikki tolir, at drálað verður longur, hava rætt til einsamallur at taka avgerð í málinum. Hann má í tí førinum hugsa um, hvussu meirilutin í kommunustýrinum mest sannlíkt hevði atkvøtt, og taka avgerð í samsvari við hetta.

Skal treytin um, at eingin ivi stendst av einum máli, vera lokin, krevst í fyrra lagi, at borgarstjórin heldur, at einki er at ivast um, og í seinna lagi, at hann metir, at *allir* hinir kommunustýrislimirnir somuleiðis halda, at einki er at ivast um. Tað er sostatt ikki nóg mikið, at borgarstjórin sjálvur er ivaleysur um, hvussu eitt mál eigur at verða loyst. At eingin ivi er um, at meiriluti er í kommunustýrinum fyri ávísari loysn, er heldur ikki nøktandi grundarlag fyri, at borgarstjórin av sínum eintingum kann taka avgerð í einum máli vegna kommunustýrið.

Hevur undir viðgerðini hjá kommunustýrinum av einum máli ivi valdað um grundarlagið fyri eini avgerð hjá kommunustýrinum, og hevur kommunustýrið kortini ikki roynt at gjørt greiðu fyri ivanum ella knýtt treytir at avgerðini, kann borgarstjórin ikki seinni broyta avgerðina hjá kommunustýrinum við heimild í § 21, stk. 3, vísandi til, at grundarlagið fyri avgerðini eyðsæð var skeivt, við tað at kommunustýrið í tí førinum sjálvt hevur tikið støðu til óvissuna um avgerðargrundarlagið. Tað hevur í tí sambandi ongan týdning, at upplýsingar koma fram, eftir at kommunustýrið hevur viðgjørt málið, sum borgarstjórin metir høvdu havt aðra avgerð við sær í kommunustýrinum, um upplýsingarnar vóru tøkar, tá ið kommunustýrið tók avgerðina.

Í telduposti til tveir kommunustýrislimir tann 23. januar 2024 endurgevur borgarstjórin í Sørvágs kommunu skrivliga frágreiðing hjá sakføraranum hjá kommununi, har ið sagt verður, at praksis, har ið fjøra í útgangsstøðinum verður príssett sum yvirliggjandi bøur, liggur so fast, at kommunan ikki hevði *stórvegis* møguleika at fáa viðhald í málinum, og at útreiðslurnar av at halda fram við rættarmálinum ikki stóðu mát við støddina á málinum. Í tí sambandi kann nevnast, at sambært fundarfrágreiðing hjá metingarnevndini sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir gjørdi formaðurin í metingarnevndini á fundi við umboð fyri Sørvágs kommunu og eigarar tann 24. juni 2021 vart við, "at praksis á Búnaðarstovuni var, at fjørulendi varð selt sum um talan var um dyrkað lendi", og á metingarskrivinum dagfestum 26. august 2021 skilst, at metingarnevndin, um talan ikki er um serlig viðurskiftir, heldur seg til prístalvuna hjá Búnaðarstovuni, hóast hon ikki formliga er bundin av henni.

Í frágreiðingini sigur sakførarin, at tað hevði verið *løgið*, um kommunustýrið fór ímóti hansara tilmæli um at taka stevningina aftur, tá ið stevningin upprunaliga varð úttikin eftir hansara tilmæli. Umhvørvismálaráðið metir ikki frágreiðingina hjá sakføraranum, sbr. eitt nú orðini *stórvegis* og *løgið*, at benda á, at støðutakanin var *so* greið, at borgarstjórin av røttum kundi leggja til grund, at *eingin* ivi kundi standast av henni hjá *nøkrum* í kommunustýrinum. At sakførarin sigur tað vera "møguligt at umsitingin átti at havt lagt spurningin um afturtøku av málinum fyri bygdaráðið, tá tað var bygdaráðið, sum tók avgerð um at stevna", talar somuleiðis ímóti, at málið var so greitt ella ikki toldi at bíða, so at onnur av treytunum í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini var lokin.

Borgarstjórin sigur seg í sama telduposti hava "handlað eftir bestu sannføring fyri kommununa". Hetta er ikki í sjálvum sær nóg mikið til, at nøkur av treytunum í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini kann sigast at vera lokin. Avgerandi er, annaðhvørt at borgarstjórin metir málið at vera so greitt, at *eingin* ivi stendst av tí hjá *nøkrum* í kommunustýrinum, ella at málið ikki tolir at bíða.

Borgarstjórin sigur, at avgerð "skuldi takast í somu løtu", sum sakførarin ringdi, men grundgevur ikki fyri, at málið ikki *toldi* at bíða, sum er ein treyt sambært § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini.

Í teldupostinum tann 23. januar 2024 endurgevur borgarstjórin sakføraran hjá kommununi fyri at siga, at borgarstjórin "hevur heimild til at taka støðu til daglig rakstrarviðurskiftir", og seinni í sama skrivi sigur borgarstjórin sjálvur, at hann sum *umisitingarleiðari* metti tað at vera best at fylgja tilmælinum hjá sakføraranum. Sum ovasti dagligi leiðari fyri umsitingina, sbr. § 21, stk. 1, 1. pkt., í kommunustýrislógini, hevur borgarstjórin ábyrgd av, at mál verða avgreidd, men borgarstjórin hevur í leiklutinum sum *umsitingarleiðari* ongan myndugleika við atliti at innihaldinum í málunum. Borgarstjórin kann tó hava slíkan myndugleika sum formaður í kommunustýrinum ella fíggjarnevndini, ella um kommunustýrið ella fíggjarnevndin hevur givið honum slíkan myndugleika.

Í teldupostinum tann 23. januar 2024 endurgevur borgarstjórin sakføraran hjá kommununi fyri at kalla málið um at taka stevningina eina *formsak*, og í telduposti til Umhvørvismálaráðið tann 20. februar 2024 sigur borgarstjórin seg hava mett, "at talan var um eina avgreiðslusak fyri kommununa, sum lá innan fyri heimildina hjá kommunustýrisformanninum".

At borgarstjórin metti tað at vera eina "avgreiðslusak" at taka stevningina aftur, ger ikki, at hann við heimild í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini vegna kommunustýrið kundi taka avgerð hesum viðvíkjandi ímóti eini samtykt hjá sama kommunustýri, sbr. brotið um § 21, stk. 3, og § 4, stk. 1, 1. pkt., á s. 6-7 omanfyri.

Eins og sakførarin hjá kommununi ásannar borgarstjórin, at hann "kanska átti at havt lagt málið um afturtøku av stevningini fyri kommunustýrið". Útsøgnin talar ímóti, at málið var so greitt ella ikki toldi at bíða, so at onnur av treytunum í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini var lokin. Borgarstjórin leggur afturat, at talan *møguliga* er um "ein minni formellan feil".

Skal ein borgarstjóri taka avgerð vegna kommunustýrið í einum máli, krevur tað lógarheimild. Slík lógarheimild finst í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini, sum ásetur, at hann bara kann gera tað í málum, sum ikki tola at bíða, ella har ið eingin orsøk er til iva. Hevur kommunustýrið frammanundan tikið avgerð um sama mál, kann borgarstjórin, hóast treytirnar í § 21, stk. 3, eru loknar, bara í heilt serligum førum taka aðra avgerð enn kommunustýrið. At taka slíka avgerð uttan lógarheimild er ikki eitt formligt mistak, men eitt týðandi løgfrøðiligt mistak og brot á legalitetsmeginregluna, sum er ein grundleggjandi fyrisitingarrættarlig meginregla.

Borgarstjórin sigur seg hava ilt við at ímynda sær, at kommunustýrið, sum eftir tilmæli frá sakføraranum hjá kommununi hevði samtykt at stevna, ikki eisini hevði fylgt ráðunum hjá sakføraranum um at taka málið stevningina aftur. At borgarstjórin hevur ilt við at ímynda sær hetta, merkir ikki, at treytin sambært § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini, um at eingin ivi skal standast av málinum, er lokin. Borgarstjórin skal eftir at hava gjørt sær eina meting meta, at *eingin* í kommunustýrinum heldur *nakran* iva vera um støðutakanina. Sum málið er upplýst,

metir Umhvørvismálaráðið ikki, at borgarstjórin av røttum kundi leggja til grund, at eingin ivi kundi standast av málinum um at taka stevningina aftur.

Samanumtikið metir Umhvørvismálaráðið, sum málið er upplýst, ikki, at nøkur av treytunum í § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini var lokin, tá ið borgarstjórin í Sørvágs kommunu vegna kommunustýrið tók avgerð um at taka stevningina, sum kommunustýrið hevði samtykt, aftur. Umhvørvismálaráðið skal leggja afturat, at hóast onnur av treytunum í § 21, stk. 3, skuldi verið lokin, so metir Umhvørvismálaráðið, sum málið er upplýst, *kortini* ikki, at borgarstjórin av sínum eintingum kundi taka avgerð vegna kommunustýrið ímóti eini samtykt hjá sama kommunustýri. Hetta tí at rætturin hjá borgarstjóranum sambært § 21, stk. 3, í kommunustýrislógini at taka avgerð vegna kommunustýrið er eitt undantak frá tí grundleggjandi meginregluni sambært § 4, stk. 1, í kommunustýrislógini um, at tað er kommunustýrið, sum hevur málsførleika at taka avgerð í einum og hvørjum máli, sum viðvíkur kommununi. Við tað at eingi onnur kommunugøgn hava málsførleika at royna avgerðir hjá kommunustýrinum, er tað í útgangsstøðinum *bara* kommunustýrið, sum kann broyta egnar avgerðir. Skal ein borgarstjóri taka slíka av avgerð av sínum eintingum, krevst – umframt at onnur av treytunum í § 21, stk. 3, skal vera lokin – at *eyðsýndir* skeivleikar eru við avgerðini hjá kommunustýrinum, at grundarlagið fyri avgerðini hjá kommunustýrinum *eyðsæð* er skeivt, ella at tað kemur kommunustýrinum undir endurgjaldsábyrgd at lata avgerðina standa við. Sum málið er upplýst, metir Umhvørvismálaráðið ikki, at talan var um nakra slíka støðu, tá ið borgarstjórin vegna kommunustýrið tók avgerð um at taka stevningina, sum kommunustýrið hevði samtykt, aftur.

**Niðurstøða**
Borgarstjórin í Sørvágs kommunu helt ikki galdandi reglur, tá ið hann vegna kommunustýrið tók avgerð um at taka stevningina, sum kommunustýrið hevði samtykt, aftur.

Vegna Umhvørvismálaráðið

Hilmar Høgenni
*deildarstjóri*